# Lærupláss hjá Rasmussen & Weihe

Hevur tú nýliga tikið ella tekur tú students-, HF- ella HH-prógv í summar, og ert tú áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving, er neyvan betri møguleiki enn eitt lærupláss hjá Rasmussen & Weihe.

Rasmussen & Weihe er ikki eitt vanligt grannskoðaravirki, tí hugsað verður ikki einans um roknskap og tílíkt. Vit eru 30 eldhugað starvsfólk, ið starvast saman í einum sera góðum arbeiðsumhvørvi. Eitt av aðalmálum okkara er, at øll starvsfólk trívast, bæði tá ið tey eru til arbeiðis, og tá ið tey hava frí.

Starvsfólkini hjá okkum skulu vera á høgum fakligum støði. Tí er ein útbúgvingarskipan løgd til rættis, og vit stuðla tær sjálvsagt so nógv sum gjørligt í tíni fakligu og persónligu menning. Frá okkara síðu er tað beinleiðis ein treyt, at tú ert sinnað(ur) at lesa HD. Ætlar tú tær síðani víðari, kanst tú til dømis lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi og harvið fáa eina hægri útbúgving, samstundis sum tú vinnur pening. Tað er sjálvandi eisini møguligt at lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark - tú kanst fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá fremstu grannskoðarafyritøku í Danmark: PricewaterhouseCoopers.

Grannskoðan var fyrr mangan hildið at vera eitt keðiligt arbeiði, har ein bara sat og stardi at tølum. Í dag er veruleikin tann, at grannskoðarin ofta virkar sum ráðgevi, og við sínum heildarinnliti í viðurskifti kundans er hann eisini førur fyri at veita virðisskapandi ráðgeving.

Jú, grannskoðan er í roynd og veru spennandi, og ein útbúgving hjá okkum gevur sera góðar framtíðarmøguleikar.

Vit rokna við, at tú skalt byrja 1. september, men vit kunnu gera eina setunaravtalu longu áðrenn vit fara í summarfrí 1. juli. Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. juni 2003.

Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole G. Nielsen ella Klaus Rasmussen.




*Lærupláss á vinnandi liðnum?*
*Rasmussen & Weihe - vinnari av Føroya Bjór Cup 2003*

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of
PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

Sosialurin 341800




Komandi vetrarhálvár skipar Alzheimerfelagið fyri diplomskeiði í Føroyum. Skeiðsfrálæran hevur til endmáls at menna førleika teirra, sum starvast á føroyska heilsu- og eldraøkinum og serliga fáast við fólk, ið eru rakt av demens.

Hetta er fyrstu ferð, at skipað verður fyri slíkum skeiði í Føroyum. Alzheimerfelagið hevur tikið stig til skeiðið, tí tað er bíligari at fáa útlendskar skeiðslærarar henda vegin enn at senda nógvar skeiðsnæmingar av landinum. Somuleiðis ber betur til at sameina holla útlendska vitan og føroysk viðurskifti við skeiði í Føroyum.

**Skeiðið er mest ætlað hesum yrkisbólkum:**
· sjúkrarøktarfrøðingum
· ergoterapeutum
· fysioterapeutum
· heilsuatstøðingum
· røktarheimsatstøðingum

Luttøkan treytar, at tú veitst eitt sindur um og hevur arbeitt við fólkum, sum eru minnisveik.

Sjúkrahjálparar og onnur, ið hava vitan um og hava arbeitt við minnisveikum fólkum ella hava aðrar førleikar, kunnu eisini søkja um at sleppa á skeiðið.

**Skeiðið verður á Hotel Vágum, og tað er í trimum pørtum:**

**15. til 19. septembur 2003**
Ástøði um demens.

**10. til 13. novembur 2003**
Samskifti, umsorgan og løgfrøði.

**7. til 9. februar 2004**
Demenssamskiparin.

Skeiðsleiðarar eru Birgitte Vølund, sjúkrarøktarfrøðingur og samskipari og Mette Søndergaard, ergoterapeutur. Aðrir skeiðslærarar eru Rolf Bang Olsen, yvirlækni á eldrasálardeild í Danmørk, ið hevur lagt útbúgvingina til rættis, og onnur, ið eru køn í minnissjúkraviðgerð og umstøðum teirra raktu í Føroyum.

Í tíðarskeiðunum millum teir tríggjar skeiðspartarnar arbeiða næmingarnir við ítøkiligari skrivligari evnisætlan, ið teir sjálvir hava valt. Næmingarnir mugu fáa frí í 7 arbeiðsdagar at gera hetta arbeiðið.

Eftir seinasta skeiðspart verða prógv handað.

Tað kostar hvørjum næmingi 19.600 krónur at taka lut á skeiðnum. Fyri hetta fær næmingurin frálæru, skeiðstilfar, einakamar og fullan kost á staðnum.

Áhugað kunnu tekna og kunna seg við at venda sær til Alzheimerfelagið áðrenn 23. juni 2003. Pláss er fyri 24 næmingum.

www.alzheimer.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · FO-100 Tórshavn · Tel 31 31 02

SANSIR TEL 355 355



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. mai 2003 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at ein partur, uml. 40 ha., av 4. grundumráði (landbúnaður) í Hoyvíkshaganum, verður broytt til D2-øki (ítróttur o.a.) og verandi D2-øki verður broytt til A3-øki (blandaða bústaða- og miðstaðabygging).

Hetta er í sambandi við øki til Tórshavnar Golfklubba, sum í dag hava sítt felagsvirksemi í økinum.

Broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mikudegi 4. juni til og við 25. juni 2003, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.30 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 4. september 2003.

SNARSKIVAN

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** 2800, Færøernes Erhvervsudviklingsfond (Framtaksgrunnur Føroya), 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður)
**Farin frá sum næstformaður:** Emma Dagmar Sandberg Joensen, 370 Miðvágur.
**Innkomin sum formaður:** Emma Dagmar Sandberg Joensen, 370 Miðvágur.
**Innkomin sum næstformaður:** Árni Matras Dam, 460 Norðskáli.
**Innkomin í nevndina:** Hans Andrias Joensen, Ovaragøta 56, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 28. mai 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 780, P/F Sam-Hald, 100 Tórshavn.

Viðtikið 22.05.2003 at lækka partapeningin við annulatión av egnum partabrøvum, við kr. 700.000,00 til kurs 100 eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 27. mai 2003*

*Kristin Balle*

---

PostScriptPicture
(Summarlegur \222 Nesv\222k.eps)

Leikurin
**Tey í Valhøll**

Dramaverkstaðið spælir nýskrivaða sjónleikin Tey í Valhøll eftir Hjørdis Johansen í Sjónleikarhúsinum í Havn.

**Frumsýning:**
Sunnudagin 1. juni kl. 16:00.
**Sýningar:**
Mánadagin 2. juni kl. 19.00
Týsdagin 3. juni kl. 19.00
Mikudagin 4. juni kl. 19.00
**Seinasta sýning:**
Hósdagin 5. juni kl. 19.00

**Dramaverkstaðið og Tórshavnar Kvøld og Ungdómsskúli**

FAROE LAW

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið



**Danstein**
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R.C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

## Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

www.sosialurin.fo